## Skype uttan teldu

Philips kemur nú á marknaðin við eini Skype-telefon, sum ikki nýtist at vera íbundin eina teldu fyri at koyra. Ein líknandi telefon er júst send á marknaðin av RTX Telecom, og hetta verður helst byrjanin til eina veruliga bylgju innan Skype-tøknina, sum ikki er heilt so nýggj longur. Telefoninarnar frá Philips og RTX kosta á danska marknaðinum ávíkavist 1.499 og 1.200 kr.

## George Best á pengaseðli



Í Norðurírlandi er ein nýggjur pengaseðil nú komin í umferð. 25. november var júst eitt ár síðani, at fótbóltslegendan George Best doyði, og tað er hann, sum prýðir nýggja fimmø-punds-seðilin. George Best var einans 59 ára gamal, tá hann doyði, og hóast hetta einamest komst av støðugari ovurnýtslu av rúsdrekka gjøgnum nógv ár, so verður hann framvegis mintur sum ein av størstu hetjunum, sum landið hevur fostrað. Í altjóða fótbóltshøpi verður hann tíðum nevndur á linju við menn sum Pelé, Maradona og Cruyff.

# Stríðið er liðugt

**Tað verður miðað skeivan vegin, tá ið tað verður skotið lærarum og pedagogum í skógvarnar, at tey kunnu ikki semjast um børnini**

SKÚLAFUNDUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Vit spyrja, hvat skúlin ætlar at læra tey seks ára gomlu. Um tað bara er at flyta fyrsta flokk eitt ár fram, so mæla vit inniliga frá at gera tað, segði Maibritt Jacobsen, pedagogur*

Tað passar ikki, tá ið tað verður sagt, at lærararnir og pedagogarnir stríðast um, um tað skal vera annar ella hin fakbólkurin, ið skal hava ábyrgdina av teimum seks ára gomlu.

Í orðaskiftinum um fólkaskúlan í Miðlahúsinum týskvøldið var tað onkra løtuna róð fram undir, at talan er um stríð millum Føroya Lærarafelag og Føroya Pedagogfelag, men hetta vildu feløgini ikki hava sitandi á sær:

– Hatta er nakað, sum politikararnir plaga at brúka, tá ið teir royna at plasera ábyrgdina onkra aðra staðni enn hjá sær sjálvum. Men soleiðis hongur tað ikki saman. Kanska hevur tað áður verið soleiðis, men nú er tað ikki soleiðis. Samstarvið millum feløgini er fyrimyndarligt. Vit fundast nógv um felags áhugamál, og vit skulu finna út av tí, um ella tá ið skúlaaldurin verður lækkaður niður í seks ár, var viðmerkingin hjá Magnusi Tausen, formanni í Føroya Lærarafelag.

Maibritt Jacobsen, pedagogur, telist millum teirra, um mánadagin handaði myndugleikanum álit frá pedagogum, sum snýr eg um, hvussu førleikin hjá seks ára gomlum er at fara í skúla:

– Vit spyrja, hvat skúlin ætlar at læra tey seks ára gomlu. Um tað bara er at flyta fyrsta flokk eitt ár fram, so mæla vit inniliga frá at gera tað. Júst í hesum skeiðinum eru børnini í stórari broyting kensluliga, sosialt, rørsluliga og málsliga. Um talan skal vera um skúla og ikki dagstovn, so mæla vit til, at pedagogar taka sær av hesi uppgávuni, sigur Maibritt Jacobsen, pedagogur.

Fundarluttakararnir vóru samdir í, at tað ikki hevur so týdning, um tað er í skúlahøpi ella stovnshøpi, at fyrsta undirvísingin gongur fyri seg.

– Innskúlingin hevur stóran týdning, og tað eigur at vera rúm fyri, at tað ikki bara er aldurin, men eisini menningin og búningin, sum er avgerandi fyri, nær børnini fara í skúla. Summi eru búgvin til tað sum seks ára gomul, og onnur eru ikki búgvin at fara í skúla, fyrrenn tey eru átta ára gomul, vóru fleiri samd um.

Leiðarin á fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum var meiri avgjørdur:

– Í øllum grannalondum okkara fara børnini í skúla, tá ið tey eru seks ára gomul. Vit eiga at flyta 1. flokk eitt ár fram. Tað ber við sær, at 10. skúlaár verður í tí aldri, sum tey nú eru í 9. flokki. So eigur 10. flokkur í núverandi líki at verða strikaður. Um vit flyta skúlabyrjanina fram, so hava børnini verið eitt ár longri í skúla, tá ið tey verða Pisa kannað, og harvið verða vánirnar fyri betri úrslitum betri, enn tey eru nú, var sjónarmiðið hjá Olausi Jespersen.

# Sjúklingurin er raskur og sunnur

**Formaðurin í mentanarnevndini hjá Løgtinginum heldur ikki alt rugga rætt, tá ið úrslitið av kanningini sigur, at skúlin er sjúkur, meðan næmingarnir tykjast raskir og sunnir og standa seg væl**

SKÚLAFUNDUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Andreas Petersen hevði hug at seta spurnartekin við trúvirði í PISA-kanningini, og segði at vit ikki mugu leypa framav og taka forhastaðar avgerðir*

Tølini siga, at vit so rudduliga eru dumpað í Pisa kanningini. Tað mugu vit fyrihalda okkum til. Um vit ikki gera tað, so hava vit ein stóran trupulleika.

Hetta vóru fleiri av teimum, sum høvdu orðið á skúlafundinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni týskvøldið so sára samd um.

Tað skortaði heldur ikki upp á uppskot um orsøkir til úrslitið og upp á, hvussu skúlin kann betrast.

– Um kommunurnar fáa fulla ábyrgd av fólkaskúlanum, so verða fyritreytirnar fyri betri skúla heilt víst betri, vóru ráðini hjá Heðini Mortensen, býráðsformanni í Havn og formanni í kommunusamskipanini, ið eisini helt, at kommunurnar hava víst t.d. í barnaansingini, at tær eru førar fyri at umsita, og at kommunurnar í t.d. barnaverndarøkinum hava víst, at tær megna væl at samstarva.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, hevði eisini sín heilivág fyri at fáa skúlan at rigga betri, enn hann ger tað nú:

– Tað er sera týdningarmikið, at privatpraktiserandi lærararnir verða avtiknir. Tað hoyrir ikki nútíðini til, at lærarin fær loyvi til at fara inn í skúlastovuna og at hurðin verður latin aftur, og at tað harvið einki samstarv verður millum lærarar og flokkar. Fleiri royndir og eftirmetingar eiga at vera í fólkaskúlanum, størri kommunur skulu hava ábyrgdina, og sentrali myndugleikin skal standa fyri visjónunum og eftirlitinum, vóru nøkur av hugskotunum hjá stjóranum í Vinnuhúsinum, sum eisini helt tað vera upplagt, at aðrir fakbólkar enn lærararnir sleppa framat:

– Um t.d. ein verkfrøðingur hevur hug at undirvísa, so eigur hann at fáa møguleika til tað, um hann skúlar seg í námsfrøði.

### Sæst ikki á sjúklinginum

Formaðurin í mentanarnevndini, Andreas Petersen, sigur, at úrslitið av PISA undankappingini kom óvart á. Hann hevði roknað við, at Føroyar fóru at liggja umleið á sama støði sum Danmark, sum gjørdist nummar fjúrtan.

– Vit í mentanarnevndini hava havt tey mongu tilmælini um, hvat skal gerast fyri at hækka støðið til viðgerðar í tvær vikur. Fyrst í desember fer Løgtingið at viðgera fólkaskúlan, og í tí sambandi fara vit at fáa fleiri upplýsingar frá Mentamálaráðnum.

Men hóast dapra úrslitið, og hóast tað ivaleyst er neyðugt at seta fleiri tiltøk í verk, so heldur Andreas Petersen, at vit ikki mugu leypa framav:

– Í mínum dagliga læknayrki havi eg í tredivu ár kannað og mett um úrslit av kanningum. Tá ið úrslitið fyriliggur, og tað tykist katastrofalt, og tá ið eg samstundis kenni sjúklingin og veit, at hann tykist hava tað gott, so spyrji eg meg sjálvan, um tað er nakað galið við háttinum, sum kanningin er gjørd uppá, og viðhvørt er tað neyðugt at gera nýggjar kanningar, var myndin, sum Andreas Petersen málaði, og hann helt fram:

– Eg havi í mong ár fylgt børnum í føroyska fólkaskúlanum. Tey síggja út til at hava tað gott, og tey flestu standa seg væl í miðnámsskúlum, og føroyingar smæðast ikki burtur ímillum á lærdum háskúlum. Vit eiga at taka Pisa undankanningina og úrslitið av fyrstu kanningina, sum fer at koma næsta ár, í størsta álvara. Men samstundis haldi eg, at vit skulu ansa eftir ikki at gera forhastaðar og avgjørdar niðurstøður. Tað er neyðugt við nýggjum kanningum, og eitt nú at fáa greiðu á, hvussu tað stendur til sammett við í grannalondunum, eitt nú tá ið tað ræður um støðið hjá lærarunum, penganýtsluna fyri hvønn næming og so mong onnur lyklatøl.

### Nógvir partar

Hanus Joensen vísti á ítøkilig mál, sum tað er neyðugt at gera nakað við, um støðið í skúlanum skal hækka:

– Partur av skúlanum er kannaður, men ikki allur skúlin. Undir kreppuni var eingin eftirútbúgving av lærarum. Nú er eitt sindur betri, men ikki nóg gott. Fysisku karmarnir eru ikki nóg góðir. Nógvir skúlar eru gamlir, ikki nútímans. Føroyski skúlin er tann bíligasti í Norðurlondum. Næmingarnir hava færri tímar, enn tey hava í grannalondunum, og lærararnir fáa minni í løn enn lærararnir í grannalondunum fáa vóru nøkur av økjunum, sum stjórin í Kommunuskúlanum í Havn helt, at tað átti at verið hugt at.